# Jólamenn á rundferð í Eysturoynni



JÓLAMENN
*Tíðindaskriv*

Eysturoyar Kunningarstova skipar aftur í ár fyri einum serligum jólatiltaki í Eysturoynni. Leygardagin 15. desember fara jólamenn at vitja allar kommunurnar í oynni. Í ár koyra jólamennirnir við brandbili, og hava teir sjálvandi okkurt gott við til øll børn í Eysturoynni.

Brandbilurin byrjar á Strondum kl. 10.00 um morgunin og síðsta steðgistað er í Fuglafirði kl. 20.00.

Brandbilurin steðgar við jólatrøini í bygdunum/ býunum.

Fyrivarni verður tó tikið fyri koyrilíkindunum, siga tey av Kunningarstovuni í Eysturoy.

## Vel bestu tekningina til frímerki

Postverk Føroya skipaði í august mánaða fyri teknikapping fyri børn upp til 14 ár. Børnini skuldu tekna sirkus. Tvær tær bestu tekningarnar skulu nýtast til frímerki, sum verða givin út tann 8. apríl 2002 í samband við árligu Europaútgávuna. Postverkið takkar fyri undirtøkuna, sum hevur verið sera góð. Ikki minni enn 1.173 tekningar eru komnar inn.

Hesar 10 tekningarnar eru valdar út, og vóna vit at tú vilt hjálpa okkum at avgera hvør tekning skal setast á frímerki. Nummarrøðin er tilvildarlig. Seinasta freist at atkvøða er 2. januar 2002.

Send lepan til Postverk Føroya, og viðmerk bjálvan "Teknikapping". Eisini ber til at atkvøða á heimasíðu okkara:

www.stamps.fo



Postverk Føroya


Nr. 1


Nr. 2


Nr. 3


Nr. 4


Nr. 5


Nr. 6


Nr. 7


Nr. 8


Nr. 9


Nr. 10

Besta tekningin er eftir míni meting nr. ☐

Send til:
Postverk Føroya
Frímerkjadeildin
159 Tórshavn

Navn ____________________
Bústaður ____________________
Postnr. ____________________
Bygd/Býur ____________________
Aldur ____________________

## Jólakonsert í Fuglafjarðar kirkju

JÓLAKONSERT
*Tíðindaskriv*

Í annaðkvøld – sunnukvøldið – verður jólakonsert í Fuglafjarðar kirkju. Við á konsertini verður hornorkestrið, sangkórið og gentukórið. Størsti parturin av skránni eru jólaløg.

Johan Hentze fer at spæla solo, og somuleiðis hevur hesin ungi tónlistamaðurin lagt til rættis eitt tónleikastykki fyri hornorkestur.

Kenneth Mcleod leiðir hornorkestrið, og Frits Johannesen leiðir kórini.

Ragnar Petersen spælir undir á urgu.

## Eystankórið jólakonsert í Glyvra kirkju

Í annaðkvøld, sunnukvøldið, kl 19 skipar Eystankóri fyri konsert í Glyvra kirkju. Eystankórið telur umleið 30 sangarar og verður í ár stjórnað av Símuni Hammer. Á skránni hesaferð eru 10 jólaløg, har nøkur av teimum mest kendu eru við, men kórið hevur í ár eisini vant inn nøkur nýggj jólaløg, ið eisini verða framførd á konsertini.

Saman við kórinum fer Jensina Simonsen eisini taka lut við klaver-og orgulfylgispæli. Meinhard Bjartalíð, prestur, fer eisini at halda eina stutta andakt, umframt at felagssangur er á skránni.

Kórið ynskir øllum vælkomin til á hendan hátt at verða við til at syngja jólini inn.

## Tøkk

fyri sýnda samkenslu við jarðarferðina hjá góðu mammu, vermammu, ommu og langommu okkara

**Bette Justinussen**
**fødd Eldevig**

Tøkk fyri blómur og kransar og peningagávur til Evangeliuhúsið.

*Familjunnar vegna*
**Olaf**

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Marguerita Petrea Olsen**

doyði og varð jarðað.

Vit takka prestinum Bjarna Bech fyri troystarrík orð á Lagargarði og í kirkjugarðskapellinum. Tøkk fyri kransar, blómur og gávur til Alzheimerfelagið.

Serliga takka vit starvsfólkunum á Lágargarði og heimahjálpunum, ið vóru um hana í heiminum. Tøkk til tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Øllum verður ynskt eini gleðilig jól og eitt vælsignað nýggjár.

*Familjunnar vegna*
**Dia og børnini**




